# um gíslar

hvat tey arbeiða við, um tey yvirhøvur arbeiða við nøkrum. Tað einasta vit síggja til felagið er, at limagjaldið verður trekt av lønarseðlinum einaferð um mánaðin. Felagið arbeiðir í hvussu er ikki fyri okkum. Nei! er eftir øllum at døma er tað einasta, nevndin dugir at siga.

Ella Danielsen og Anna Elisabeth Victorsdóttir vísa á, at sjálvt um rakstrartølini, ið leiðslan legði fram tá, vístu, at um broytingar ikki verða gjørdar, verður stovnurin koyrdur í senk, so fingu limirnir onki at vita frá nevndini.

- Har var deyðatøgn; vit hoyrdu púrt onki frá felagnum, siga tær báðar kvinnurnar. Tær óttast fyri, at um felagið ikki tekur annað skinn um bak, verður hetta ikki tann seinasta hópuppsøgnin í Postverki Føroya.

### Felagið tagdi

Tað, sum undrar bæði Ellu Danielsen og Onnu Elisabeth Victorsdóttir, er, at fyri smáum trimum árum, tá táverandi leiðslan segði níggju fólkum úr starvi, hoyrdist so at siga onki til Postfelagið. Tey flestu uppsøgdu ta ferðina vóru kvinnur inni í húsinum. Niðurstøðan hjá Ellu Danielsen og Onnu Elisabeth Victorsdóttir er, at av tí at onki postboð var ímillum tey uppsøgdu, tímdi Postfelagið onki at gera við tær uppsagnirnar.

- Felagið var so at siga púra kúrt tá, men ramaskríggið vit sóu hesuferð vísir bara, at stórur munur er á okkum limun. Vit føla ikki, at hetta á nakran hátt er okkara felag. 90 prosent av sáttmálanum umfatar postboðini, sum er gjørdur so langt niður í smálutir, at leiðslan ongar møguleikar hevur at gera broytingar. Formligu leiðsluna hevur postverksstjórin, men veruliga valdið liggur hjá Postfelagnum, og vit vanligu starvsfólk eru gíslar í hesum maktspæli, siga Ella Danielsen og Anna Elisabeth Victorsdóttir.

Kvinnurnar vísa á, at stóra stríðsmálið millum leiðsluna og fakfelagið er tann góða akkordskipanin, sum postboðini hava, og sum ikki má rørast. Hetta hóast partarnir í sáttmálasamráðingum fyri seks árum vóru samdir um eitt protokollat ið segði, at sáttmálin ikki var nútíðarhóskandi.

Ella Danielsen og Anna Elisabeth Victorsdóttir siga, at nú postverkið er vorðið partafelag við nýggjari leiðslu, høvdu tær rokna við broytingum og glett seg til nýggjar avbjóðingar.

- Hendan menningin halda vit verður forðað av einum bólki av starvsfólkum, og tað er sera óheppið. Vit føla, at hesin bólkur einsamallur vil gera av, hvussu tingini skulu vera og samstundis stýra okkum øðrum. Í dag nyttar tað bara ikki at seta seg aftur á og siga, at onki má broytast, tí vit mugu altíð vera opin fyri broytingum. Tí er hendan togtogan um rættindi hjá bert einum parti av starvsfólkunum nakað, sum vit avgjørt ikki stuðla, og sum heilt avgjørt ikki er til okkara fyrimuns. Vit óttast fyri, at áðrenn long tíð er fráliðin, mugu vit aftur siga farvæl til fleiri av starvsfeløgum okkara, siga tær báðar kvinnurnar á Postverki Føroya.

## FAKTA

**Ótíðarhóskandi sáttmáli**

Protokollat I frá 5. mai 2001 viðvíkandi sáttmálanum millum Føroya Postfelag og Fíggjarmálastýrið (núverandi Fíggjarmálaráðið): »Ásannandi at galdandi sáttmáli, bæði í bygnaði og innihaldi, ikki er nútímans, eru partarnir samdir um at seta ein arbeiðsbólk at tillaga sáttmálan í sáttmálaskeiðnum soleiðis, at hann verður einfaldari, greiðari og liðiligari og eisini er betri í samsvari við viðurskiftini á føroyska arbeiðsmarknaðinum í dag. Arbeiðsbólkurin skal eisini kanna møguleikarnar fyri at gera eina nýggja lønarskipan, sum tekur hædd fyri ábyrgd, royndum, útbúgving, eftirútbúgving, arbeiðsbyrðu v.m. Í arbeiðsbólkinum skulu vera fýra limir, har hvør parturin útnevnir tveir limir. Arbeiðsbólkurin skal mannast í seinasta lagi 1. juni 2001.« (Sambært postverksstjóranum hevur hann heitt á Postfelagið um at fara undir hetta arbeiðið. Leiðslan í Postverkinum hevur valt sínar tveir limir, men Postfelagið hevur ikki valt sínar. Postfelagið hevur boðað postverksstjóranum frá, at felagið ikki ynskir at fara undir hetta arbeiði nú. Felagið vil hava traditionellar sáttmálasamráðingar.)

# Øll mugu tillaga seg

**Postverksstjórin vil hava størri fleksibilitet inn í skipanina hjá postboðunum, so talið av teimum, ið eru til arbeiðis í senn verður lagað eftir, hvussu nógv er at gera. Sáttmálin forðar fyri at flyta postboðini til annað arbeiði, tá minni er at gera**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*- Við hugburðinum um ikki at ganga við til nakrar grundleggjadi broytingar í sáttmálanum hjá postboðunum, er felagið við at saga sína egnu grein av, heldur stjórin í Posterki Føroya, Sofus Clementsen*

*Mynd: Sunva Lassen*

Minni enn eitt ár er síðani, at Sofus Clementsen setti seg í stjórastarvið á Postverki Føroya, hevur hann longu merkt, at tað ikki er nøkur løtt uppgáva at gera broytingar á hesum stóra almenna stovni, sum nú er gjørt til partafelag. Tað sama gjørdu stjórarnir áðrenn hann.

Nýggi stjórin setti sær fyri rættiliga skjótt at nýtímansgera stovnin, og hetta gerst eftir øllum at døma ikki, uttan at broyta sáttmálarnar hjá einum parti av starvsfólkunum, postboðunum, ið arbeiða eftir eini akkordskipan. Ein skipan, ið bæði postverksstjórin og starvsfólk aðrastaðni í fyritøkuni, halda vera ein forðan fyri menning á Postverkinum.

- Sáttmálin er so strammur, at tað er sera trupult at flyta postboð til annað arbeiði, har tørvur er á tí. Hetta er mest galdandi fyri tey størstu økini, sigur Sofus Clementsen.

- Nevndin í Postfelaginum tosar um vunnin rættindi, men vunnin rættindi nytta lítið, tá tey bert verða nýtt til at saga greinina av, ein sjálvur situr á, heldur postverksstjórin.

Postverkið hevur trý høvuðsøki. Tað fyrsta er brævaútbering og frímerkjasølu, sum í fjør gav eitt avlop upp á 18,2 mió. kr. Næsta er pakkar, peningaflutningur og útbering av reklamum, sum gav eitt hall upp á 20,5 mió. kr., meðan triðja økið er frakt og skundsendingar, sum góvu eitt avlop upp á 2,5 mió. kr. Sostatt gjørdist úrslitið bert 676.000 kr. í avlopi og munandi vánaligari enn í 2005, tá avlopið var 4.278.000 kr.

- Fleiri strategiskar avbjóðingar eru fyri framman. Tann fyrsta er gera útberingina smidligari, og tað næsta er at endurskoða posthústænasturnar. Her fara vit millum annað at lata okkum inspirera av tí, sum postverkini í grannalondunum hava gjørt, men tað krevur, at vit finna ein betri hátt at samstarva uppá, sigur Sofus Clementsen. Postverksstjórin leggur dent á, at hóast tað sum er farið fram í seinastuni, so er hann til eina og hvørja tíð til reiðar at hyggja frameftir og samstarva, tí tað er hetta, tørvur er á.

# Formaður lovar broytingar

**Heidi Biskopstø, sum varð vald til formann í Postfelag Føroya fyri fýra mánaðum síðani, heldur ikki, at atfinningarnar hjá Ella Danielsen og Anna Elisabeth Victorsdóttir, um at felagið bert røkir áhugamálini hjá postboðunum, eru rættur. Kortini lovar hon, at felagið fer at ganga við til at gera broytingar. Men so skal felagið hava nakað afturfyri**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Kári Mikkelsen*
*kari@sosialurin.fo*

Í mars fekk Postfelag Føroya nýggjan formann, ella rættari forkvinnu, tá Heidi Biskopstø í Klaksvík setti seg í formannstólin. Hon er eitt sindur bilsin yvir atfinningarnar hjá tveimum kvinnum á Postverkinum, sum halda, at Postfelagið sjálvt hevur eina stóra skyld í niðurskerjingunum á Postverkinum, sum fyri tveimum vikum síðani førdi til, at 15 fólk vórðu søgd úr starvi.

- Eg haldi, at mátin sum samskiftið millum leiðsluna á Postverkinum og okkum fer fram uppá, er skeivur. Ístaðin fyri at kalla okkum inn sum felag fyri at tosa um broytingar á stovninum, verða hesar lagdar fram á starvsfólkafundi, sigur Heidi Biskopstø.

Hvat er trupulleikin í tí?

- Tá ætlanir eru um at gera so týðandi broytingar, mugu vit sum felag kunna krevja at verða kunnaði fyrst, sigur nýggja forkvinnan í Postfelagnum, men leggur dent á, at felagið sjálvandi ynskir at samstarva við leiðsluna.

- Vit ynskja eisini, at tað skal gangast væl hjá Postverkinum, sigur Heidi Biskopstø.

Hvat sigur tú til atfinningarnar um, at tit bara duga at siga nei og einans røkja áhugamálini hjá postboðunum?

- Tað passar ikki. Sum felag arbeiða vit fyri allar limirnar. Eitt dømi um tað er, at tað kemur ein donsk fakfelagskvinna frá HK at greiða frá, hvussu tey kláraðu broytingarnar í danska postverkinum, tá hetta varð prisvatiserað. Hendan kvinnan tekur sær júst av teimum, sum arbeiða innan skrivstovuyrkið í Post Danmark, sigur Heidi Biskopstø, sum í dag skuldi koma aftur av arbeiðsferð í Danmark, har hon hevur hitt onnur umboð fyri norðurlendsk systirfakfeløg.